# Jógvan, Bjarni og Jógvan í landsstýrið

**Fólkaflokkurin hevur kosið sær Jógvan á Lakjuni og Jógvan við Keldu sum landsstýrismenn aftur at Bjarna Djurholm, sum heldur fram í Vinnumálastýrinum**

NÝTT LANDSSTÝRI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Kartin Hansen, fráfarni fíggjarmálaráðharrin, ynskir nýggja mentamálaráðharranum, Jógvani á Lakjuni, tillukku*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jógvan á Lakjuni fer at umsita mentanarmál, Bjarni Djurholm vinnumál, og Jógvan við Keldu fer at umsita nýggja aðalráðið, Innlendisráðið.

Hvørki Jógvan við Keldu ella Jógvan á Lakjuni hava áður roynt seg í landsstýri, men báðir hava hollar royndir frá tingarbeiði – og Jógvan við Keldu hevur harumframt drúgvar royndir í kommunalpolitikki í ein mansaldur. Hann hevur verið borgarstjóri í Klaksvík í 16 ár.

Jógvan á Lakjuni er 51 ára gamal og úr Fuglafirði. Hann er sonur Mariu og Jákup Oluf á Lakjuni og er giftur Odvør, sum er dóttir Herborg og Gunnar Gunnarsson í Havn. Jógvan er útbúgvin lærari. Hann var sjómaður frá 1969-72 og fólkaskúlalærari frá 1977-89 og lærari á Handilsskúlanum á Kambsdali síðani 1989.

Hann hevur verið løgtingsmaður síðan mai 1998. Hann sat sum varamaður á tingi í styttri og longri tíðarskeið frá 1989 til 1996.

Jógvan við Keldu er 60 ára gamal. Hann er úr Klaksvík, sonur Giggu og Theodor við Keldu. Hann er giftur Betty, sum er dóttir Betty og Peter Skaale av Toftum. Hann er útbúgvgin innan skrivstovu- og handil frá 1961-64 hjá J. F. Kjølbro í Klaksvík.

Jógvan hevur verið býráðslimur í Klaksvík síðani 1971, býráðsformaður 1981-88 og aftur frá 1993-2000. Hann hevur verið løgtingsmaður frá 1988-90 og aftur síðani 1998.

Bjarni Djurholm er 46 ára gamal. Hann er úr Kollafirði, sonur Gündu og Niels Paula Djurholm. Hann er giftur Eydnu Djurholm, f. Jacobsen.

Bjarni Djurholm er útbúgving lærari. Hevur starvast sum lærari á Skúlanum á Trøðni 1982-84 og á Tekniska Skúlanum í Havn frá 1984-96. Síðani 1996 hevur hann verið varaskúlastjóri á Eysturskúlanum, higani hann hevur havt farloyvi síðani hann varð landsstýrismaður í august 2000.

# Olav Enomoto og Jaspur Vang á ting



*Nýggju tingmenninir hjá Sambandsflokkinum eru Jaspur Vang av Tvøroyri og Olav Enomoto úr Vestmanna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Varatingmenn hjá Johan Dahl og Bárði Nielsen verða ávikavist Olav Enomoto úr Vestmanna og Jaspur Vang á Tvøroyri**

NÝTT LANDSSTÝRI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nú Bárður Nielsen og Johan Dahl fara í landsstýrið, koma Jaspur Vang og Olav Enomoto á ting

Báður Nielsen fekk eitt sera gott persónligt val í Norðstreymoyar valdømi á valinum 20. januar. Hann fekk heilar 357 atkvøður. Næstur á listanum var Olav Enomoto, sum við 78 atkvøðum er næstur – og fær hann tí sæti á tingi so leingi Bárður Nielsen er landsstýrismaður.

Johan Dahl var við 245 persónligum atkvøðum fyrstur á sambandslistanum í Suðuroy. Næstur honum er Jaspur Vang við 174 atkvøðum, og verður hann løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin í Suðuroy so leingi Johan Dahl er fiskimálaráðharri.

# Johan fiskimálaráðharri og Bárður fíggjarmálaráðharri

**Johan Dahl í Vági og Bárður Nielsen í Vestmanna verða landsstýrismenn Sambandsfloksins**

NÝTT LANDSSTÝRI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Johan Dahl*



*Bárður Nielsen*

Bárður Nielsen í Vestmanna verður landsstýrismaður í fíggjarmálum, og Johan Dahl úr Fámjin verður landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Bárður Nielsen er 31 ára gamal. Hann er sonur Gunnvá Winther og Boga á Steig. Hann er giftur Rakul, sum er dóttir Jórun og Jóan Magnus Lamhauge í Havn.

Bárður er roknskaparleiðari hjá Kollafjord Pelagic síðani 2001. Frammanundan var hann grannskoðari hjá P/F Rasmussen og Weihe frá 1993-2000.

Báður Nielsen varð valdur á ting í 2002 og varð afturvaldur á valinum 20. januar við 357 persónligum atkvøðum.

Johan Dahl er 44 ára gamal. Hann er sonur Ebbu, f. Albinus, nú Hovgaard, og Jógvan Dahl úr Vági. Hann er giftur Lindu Herdalur.

Johan er útbúgvin bankamaður í 1981 og hevur ávís prógv innan merconomútbúgving. Hann var stjóri hjá A/S J. Dahl Gørðum og Vágs Skipasmiju frá 1982-90, stjóri í World Seafood 1991-1992, í Spf. Faromar frá 1997 og síðani 1998 í Faroe Coldstores.

Johan Dahl varð valdur á ting í 2002 og afturvaldur á valinum 20. januar við 245 atkvøðum.

# Jákup, Poul og Kjartan á ting

**Tríggir eykamenn úr Fólkaflokkinum verða at síggja í tinginum, nú flokkurin hevur kosið sær landsstýrismenn: Jákup Mikkelsen fyri Jógvan við Keldu, Poul Michelsen fyri Bjarna Djurholm og Kjartan Joensen fyri Jógvan á Lakjuni**

NÝTT LANDSSTÝRI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í Norðoya valdømi gjørdist Anfinn Kallsberg stóri atkvøðuslúkurin. Hann fekk 819 persónligar atkvøður. Næstur honum var Jógvan við Keldu við 198 og bert fýra atkvøður aftari var Jákup Mikkelsen, sum nú altso skal røkja tingsessin fyri Jógvan við Keldu.

Í Suðurstreymoyar valdømi var Bjarni Djurholm fremstu av fólkafloksmonnunum. Hann fekk 595 persónligar atkvøður. Næstur honum var Óli Breckmann við 450 atkvøður. Síðani kom Poul Michelsen við 335 atkvøðum. Hann tekur í morgin sæti á tingi fyri Bjarna Djurholm, sum heldur fram í landsstýrinum.

Í Eysturoyarvaldømi var Jógvan á Lakjuni fremstur á fólkaflokslistanum. Hann fekk 409 persónligar atkvøður, og næstur honum var Kjartan Joensen í Leirvík. Hann fekk 155 atkvøður - og verður tað hann, ið fer at røkja tingstarvið, nú Jógvan á Lakjuni verður landsstýrismaður.





*– Eg njóti tíðina, sum eg havi saman við Victor. Og eg bíði tolin til hugurin at syngja og framføra av álvara kemur aftur. Tí tað veit eg, at hann ger, sigur Rannvá Joensen, sum bleiv kend í Danmark sum onnur helvtin av duettini Creamy*

Creamy mamman:

# Eg fari aftur at syngja

**Hon bleiv heimskend í Danmark fyri nøkrum árum síðani, tá hon saman við vinkonu síni Rebecca myndaði duettina Creamy. Á sumri í 2002 fór Creamy í søguna, og fyri trimum mánaðum síðani fekk Rannvá Joensen ein son. Men hon hevur framvegis ætlanir um at fara aftur at syngja og framføra**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Rannvá Joensen er 18 ára gomul og júst vorðin mamma til ein fittan drong, sum eitur Victor. Hann varð føddur tann 30. november í fjør, og Rannvá gongur nú heima og hugnar sær saman við soninum. Hon hevur ikki sungið nakað serligt síðani tær seinastu konsertirnar við Creamy, sum vóru á sumri í 2002.

Men Rannvá hevur kortini ikki slept tónleikinum heilt. Henni dámar framvegis líka væl at syngja, men hon tekur tað bara róligt fyri tíðina. Hon veit ikki, nær hon fer aftur í holt við tónleikin, men tann stóri dreymurin hjá henni er at geva eina jazz fløgu út.

– Tað kann fara at verað um eitt ár, og tað kann eisini verða, tá eg eri fylt 30 ár, sigur songkvinnan, sum býr hjá foreldrunum hjá sær í Aalborg.

## Bíðistøða

Rannvá sigur, at henni dámar sera væl at framføra og syngja, men hon kann sigast at vera í eini bíðistøðu nú. Tí hugurin til sang og framførslur er har enn, men ikki nóg góður til, at hon veruliga ger nakað við tað.

Henni hevur altíð dámt væl at framføra og syngja, men tað, sum kom í kjalarvørrinum av Creamy og at blíva kend, var minni gott, heldur hon.

– Tá fólk kenna teg aftur, mást tú altíð vera tilreiðar við einum smíli ella einum autografi, og tað kann vera troyttandi ikki at kunna ganga á gøtuni uttan at vera steðgað, sigur hon.

Hóast hetta, so hevur Rannvá ætlanir um at byrja aftur at syngja, hon veit bara ikki, nær tað verður. Hon hevur góðar stundir og dámar væl at ganga heima og hugna sær við soninum. Hon sigur, at tað var ein stór broyting í lívinum at gerast mamma, men hon hevur fingið nógva og góða hjálp frá mammu síni.

– Eg fari aftur á pallin,tá stundin er til tað. Tað er ikki nakað, sum eg hugsi um til dagligt. Eg bíði bara til hugurin til tað kemur aftur av álvara, og so fari eg í gongd aftur. Eg veit, at eg fari at tíma aftur, sigur føroyski songfuglurin í Aalborg púra avgjørd á málinum.

## Vinkonur

Hin helvtin av Creamy, Rebecca býr í Hirtshals, og tær báðar síggjast ikki so nógv fyri tíðina. Tær hava hvør sítt lív. Rannvá við sínum barni í Aalborg, og Rebecca á einum skræddaraskúla í Hirtshals. Rebecca hevur ætlanir um at gerast sniðgevi, og Rannvá hevur ikki enn tikið støðu til, hvat hon ætlar sær, tá Victor er blivin størri.

– Vit síggjast ikki so nógv longur, men tá vit so síggjast, so hava vit altíð nógv at práta um. Vit eru framvegis vinkonur, greiðir Rannvá frá.

Tað er áleið ein tími ímillum tær báðar at koyra, og tað ger ivaleyst sítt til, at tær ikki síggjast so ofta.

## Hatta var tað

Creamy kom flúgvandi inn á danska marknaðin í 1999, tá tær góvu út fløguna Æblemand. Árið eftir kom so enska fløgan We got the time og í 2001 góvu tær út eina jólafløgu. Umframt útgávurnar hildu tær nógvar konsertir, og tað var ein strævin, men stuttlig og spennandi tíð, minnist Rannvá aftur á.

Tað vóru boð eftir gentunum allastaðni, og fløgurnar gingu sum heitt breyð.

Men á sumri í 2002 høvdu tey øll fingið nóg mikið. Tey hittust øll til eitt prát, um hvat tey skuldu gera framyvir. Rannvá greiðir frá, at tey vóru samd um, at hatta var tað, og at Creamy skuldi fara í søguna.

– Tað vóru sjálvandi nógv børn og ung, sum eftirlýstu okkum og vóru hørm, men hatta vóru vit samdar um, var tað rætta at gera, sigur Rannvá, sum als ikki letur til at hava angrað avgerðina eina løtu.

Aftaná fór Rannvá á eftirskúla í eitt ár, síðani arbeiddi hon sum húshjálp í eina tíð.

– Og so var eg eisini við barn, so nógv er hent hetta hálva annað árið, og eg havi ikki havt stundir at hugsa um, um eg angri tað ella ikki. Eg sakni tað ikki so nógv, men tó sakni eg at framføra, viðgongur unga mamman.

## Til Føroyar

Rannvá hevur júst verið í Føroyum og vitjað. Elsti beiggi hennara, Sámal, er júst fluttur aftur til Føroya at búgva, so hon og Victor fóru at vitja hann.

– Eg eri sera tætt knýtt at mínum trimum beiggjum, og eg vildi sleppa at vitja hann. Og so sjálvandi at vísa Victor fram fyri familjuni í Føroyum, greiðir Rannvá frá.

Hon hevur sjálv ikki búð í Føroyum, síðani hon var fýra ára gomul, men hóast tað tosar hon avbera væl føroyskt. Tey tosa føroyskt í heiminum, men uttanfyri heimið tosar Rannvá bert danskt.

Hon sigur, at hon kundi hugsað sær at komið til Føroyar at búð í eina tíð.

– Serliga aftaná at eg fekk Victor er hugurin og tørvurin til at vera saman við familjuni í Føroyum voksin nógv, so tað kann væl verða, at eg flyti heim í eina tíð, sigur Rannvá Joensen.